*– Norðurkorea má velja - kjarnorkuvápn ella eina framtíð, tí bæði fær landið ikki*

*amerikanski varauttanríkisráðharrin*

SAMBAND
ÁRNI JOENSEN
FARTEKST@MAIL.DK
TLF 341800

ÚTLOND

# Silvurvinnarin deyður


*Søguliga myndin frá olympisku leikunum í Meksiko í 1968*

**Avstralski rennarin Peter Norman vann silvur á olympisku leikunum í Meksiko í 1968, men tað var heiðursmerkjahandanin, sum gjørdist søgulig, og sum gjørdi hann til ein søguligan silvurvinnara**

Peter Norman kom á mál í 200 metra renningini við tíðini 20,06 sekund, sum enn tann dag í dag er avstralskt met. Tað var kortini ikki nóg mikið til at vinna. Fremstur á mál var amerikanarin Tommie Smith, og nummar trý var John Carlos, ið eisini var amerikanari.

Felags fyri teir báðar amerikanararnar var, at teir vóru svartir. Í USA var stríðið fyri rættindunum hjá teimum svørtu í hæddini, og tá teir tríggir tóku ímóti heiðursmerkjunum, valdu teir at gera vart við tað. Smith og Carlos høvdu svartan handska á aðrari hondini, og tá lagið til amerikanska tjóðsangin rungaði á olympiska leikvøllinum í Meksiko býi, lyftu teir hondina við handskanum og knýttu nevan. Vanligt er, at ítróttarfólkini hyggja at flagginum í hesari løtu, men Smith og Carlos gjørdu tað øvugta.

Høgrumegin á sigurspallinum stóð Peter Norman, og fyri at vísa sín samhuga við hinum báðum og teimum svørtu í USA, hevði hann sett stríðsmerki teirra á bringuna.

– Øll eiga at hava somu rættindi. Øll eru født til somu rættindi og skulu hava somu viðferð, segði hann seinni.

Í gjár bleiv kunngjørt, at Peter Norman var deyður av einum hjartatilburði. Tann kendi silvurvinnarin var 64 ára gamal, nú hann doyði.

# Norðurkorea fær knívin á barkan

**– Norðurkorea noyðist at velja, um landið vil hava eina framtíð ella kjarnorkuvápn. Talan verður ikki um bæði, sigur USA**

Síðani Norðurkorea fyri nøkrum døgum síðani boðaði frá, at landið fyrireikar seg til eina kjarnorkuroyndarspreinging, hevur stórt diplomatiskt virksemi verið í Fjareystri og á ST-høvuðsborgini í New York.

Japan og Suðurkorea hava gjørt greitt, at tey fara ikki at góðtaka, at Norðurkorea roynir eina kjarnokrubumbu, og amerikanskir talsmenn eru sera hvassorðaðir.

– Norðurkorea noyðist at velja, um landið vil hava kjarnorkuvápn ella eina framtíð, tí talan verður ikki um bæði, sigur amerikanski varauttanríkisráðharrin Christopher Hill. Hann vil ikki siga, hvat USA ætlar sær at gera við málið, men USA fer ikki at bíða, til Norðurkorea hevur fingið sær kjarnorkuvápn, sigur hann við AP.

Í New York roynir amerikanski ST-sendiharrin, John Bolton, at fáa trygdarráðið at semjast um neyðug stig. Í gjár hevði ráðið fund um ta spentu støðuna, og sambært bretska sendiharranum, Emyr Jones Parry, samdist ráðið um at lata ein serfrøðingabólk gera eitt tilmæli um, hvørji stig ST eigur at taka.

Amerikanarar hava kært seg um, at Russland og Kina vilja ikki fordøma Norðurkorea og tess ætlanir, men russiski uttanríkisráðharrin, Sergej Lavrov, sigur við Reuters, at Russland kann als ikki góðtaka eina norðurkoreanska kjarnorkuroyndarspreinging. Kinesika stjórnin avsannar eisini, at hon skal hava verið ov afturhaldandi í sínum atfinningum at norðurkoreanskeu ætlanini.

Norðurkoreanar sjálvir hava ikki sagt eitt orð um tey nógvu mótmælini.

## STUTT SAGT

### Verða kanska skuldsettir fyri dráp

Flogskipararnir á tí lítla amerikanska flogfarinum, sum stoytti saman við eitt brasilskt ferðamannaflogfar í síðstu viku, verða møguliga skuldsettir fyri dráp. Brasilska flogfarið datt niður, og øll tey 155, sum við vóru, lótu lív. Tað lítla flogfarið neyðlendi í øllum góðum.

Teir báðir amerikonsku flogskipararnir eru framvegis í Brasil, og teir sleppa ikki haðani, tí myndugleikarnir hava tikið passið frá teimum. Løgregluovastin, Geraldo Pereira, sigur við AFP, at løgreglan hevur fingið boð um at kanna, um teir báðir flogskipararnir viku frá galdandi lógum undan sjálvum samanstoytinum.

Amerikanska flogfarið, sum var á veg til høvuðsstaðin Brasilia við sjey ferðafólkum, fleyg í 37.000 fóta hædd, men fekk boð um at fara niður í 36.000 fóta hædd. Spurningurin er, um flogskipararnir ikki hoyrdu ella ikki gjørdu eftir boðunum við tí úrsliti, at tey bæði flogførini bóru við hvørt annað.

### Samráðingar í Kolombia

Fyri fyrstu ferð í fleiri ár eru nú vónir um, at endi kann fáast á tí drúgvasta borgarakrígnum í Suðuramerika. Í hvussu er hava stjórnin hjá Álvaro Uribe, forseta og uppreistrarrørslan FARC játtað at koma til samskifta, og sum tað fyrsta stigið tingast teir nú um at lata fangar hjá hvør øðrum leysar, skrivar spanska blaðið El Pais.

Spania, Frakland og Sveis hava teir seinastu tíggju mánaðarnar roynt at fáa partarnar at samráðast um at enda borgarakríggið, og londini eru væl nøgd við, at stjórnin og FARC eru sinnað at lata fangar leysar. Í fyrsta umfari skal FARC hava játtað at lata 59 burturflutt fólk leys aftur fyri 500 uppreistrarmenn, sum kolombiski herurin hevur tikið.

Álvaro Uribe, sum varð afturvaldur á forsetavalinum í mai, hevur fyrr sýtt fyri at tingast við ta vinstrasinnaðu uppreistrarrørsluna, og undir valstríðnum tá segði hann, at talan bleiv ikki um nakrar tingingar, fyrr enn FARC hevði lagt vápnini. Men hann hevur broytt hugsan, og nú sigur hann seg vera sinnaðan at hitta leiðaran í FARC, skrivar El Pais.

### Hummarastríð í Noregi

Tann 1. oktober byrjaði veiðitíðin hjá norskum hummarabátum, men bæði fiskimenninir og fiskifrøðingarnir kæra seg, at hummarastovnurin er sera illa fyri.

Fiskifrøðingarnir siga, at tann norski hummarin er komin í vanda, eftir at tann amerikanski hummarin, sum er væl størri enn tann norski, er vorðin alt meiri vanligur í Noregi. Í fjør fingu fiskimenninir fleiri amerikanskar hummarar í rúsurnar, og fiskifrøðingarnir vænta, at teir fara at fáa uppaftur fleiri í ár.

Fleiri norðmenn innflyta livandi amerikanskar hummarar, og í summum førum verða teir settir í rúsur, áðrenn teir verða tiknir. Men vanlukkutíð hendir tað javnan, at hummararnir sleppa úr rúsunum, og tað kann vera sera óheppið. Eitt er, at tann amerikanski hummarin er størri og sterkari enn tann evropeiski, men verri er, at hann hevur eitt slag av bakterium í sær, sum eru lívshættisligar fyri tann evropeiska hummaran, sigur Ann Lisbeth Agnalt á norsku fiskirannsóknarstovuni við Aftenposten. Hon mælir myndugleikunum til at seta forboð fyri at innflyta amerikanskar hummarar.